

# VERKFØRARI

## P/F Wenzel søkir eftir Verkførara til mekaniska verkstaðin.

Til verkstaðið sóknast vit eftir dugnaligum verkførara at byrja sum skjótast.

**Førleikar**
Sum Verkførari skipar tú fyri dagliga virkseminum á verkstaðnum hjá okkum. Vit leggja stóran dent á, at tú hevur flair fyri kundarøkt og royndir frá bilvinnuni, møguliga frá líknandi starvi. Eisini ert tú røkin og dugir at varðveita yvirlitið, eisini tá á stendur.

**Vit bjóða**
Vit kunnu bjóða tær eitt áhugavert starv við nógvum avbjóðingum í einum ungum toymi. Lønin er sambært avtalu.

**Umsókn**
Merk umsóknina "Verkførari", og send hana í seinasta lagi 11. september 2006, til

**P/F Wenzel**
**Akranesgøta 5**
**100 Tórshavn**

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Eru spurningar viðv. starvinum, ert tú vælkomin at venda tær til Oddmar Ørvarodd, tel. 55 45 13.

www.wenzel.fo



**P/F WENZEL**
Akranesgøta 5
Tórshavn
Tel 354500

Ford

TEAM85

## Vilt tú verða við í einum virki í menning?

**P/f Sveisingahandilin**
søkir fólk til goymsluna

**Starvið**
Starvið fevnir m.a. um:
· Vøruútkoyring
· Goymsluarbeiði
· Røkt av bilum
· Avgreiðslu av viðskiftafólki
· Fylling av trýstfløskum
· Annað fyrifallandi arbeiði

**Umsøkjarin**
Av umsøkjara krevst:
· At viðkomandi hevur hug at royna nýggjar leiðir
· At viðkomandi er álítandi, røkin og fyrikomandi
· At viðkomandi hevur evni at samstarva og arbeiða sjálvstøðugt
· At viðkomandi hevur koyrikort til lastbil

**Umsóknir**
Umsókn saman við prógvum, viðmælum v.m. skal sendast til P/f Sveisingahandilin, Postboks 18, FO-110 Tórshavn í seinasta lagi 6. september 2006.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Bárður Simonsen á tel 311909 ella 231920.

Allar upplýsingar og umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

P/f Sveisingahandilin hevur síðan 1948 verið í menning, og er í dag størsti veitari av sveisiútgerð og ídnaðargassi í landinum.

Vøruúrvalið umfatar alt innan sveising:
· Ídnaðargass
· Propangass
· Elektrodir
· Lodditráð
· Sveisiapparatir
· Sveisi og skerisett
· Trygdarútgerð
· Amboð

Vit eru eisini aðalumboð fyri ExxonMobil smyrjioljur í Føroyum.

Vit eru veitarar til skip, bátar, flakavinnuna, alivinnuna, byggivinnuna, skipasmið, sjúkrahús og smiðjur.

**P/f Sveisingahandilin**
Mykinesgøta 8 · FO-100 Tórshavn
Tel 31 19 09 · sveising@post.olivant.fo

TEAM85



## Sølufólk til Klokkuna

Vit sóknast eftir sølufólki til nýggju Klokkuna í SMS. Í Klokkuni verður tað besta innan smykkur, ur og gávulutir at finna, umframt at vit eisini hava urmakaraverkstað.

Til henda handil sóknast vit eftir einum sølufólki, ið skilir týdningin av at geva kundum okkara bestu tænastuna og eitt gott upplivilsi.

Vit vænta at:
- Tú setur kundatænastu hægst og ert fyrikomandi.
- Tú ert ágrýtin.
- Tú ert til reiðar at lyfta eyka tøk tá hetta krevst.
- Tú hevur royndir innan handilsvirksemi.

Vit kunnu bjóða tær:
- Eitt avbjóðandi starv í einari virknari fyritøku.
- At vera partur av einum ungum og virknum starvsliði, ið altíð skal menna okkara virkisøki.
- Góðar karmar at trívast og mennast innan handilsvinnuna.

Ert tú til reiðar at átaka tær hesa avbjóðing, vilja vit fegin hoyra frá tær. Set nøkur orð saman um teg sjálva/n, merk brævbjálvan "Klokkan" og send tey til:

3-arin Group
Postmoga 1057-1058
FO-110 Tórshavn

Ella ring til Hans á tel 216800 fyri at frætta meir um hetta spennandi starv.

**Klokkan**
Tín ur- og gullsmiðjur

**Fráferð úr Tórshavn mánadag klokkan 17.00**
**Koma á Seyðisfjørð týsmorgun kl. 09.00**
**Fráferð Seyðisfjørður mikukvøld kl. 18.00**
**Koma til Tórshavn hósdag kl. 11.00**

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC
WWW.SMYRIL-LINE.FO
TLF 34 59 00






Njótið Ísland í hálvanannan dag. Síggið víddirnar, stórfingna mánalandslagið og baði í heitum keldum. Hugnið tykkum á túrinum við góðum mati, avslapping og shopping.

Ókeypis gisting umborð á Norrönu náttina millum týsdag og mikudag. Týskvøldið verður dansur við livandi tónleiki.

Møguleiki er at taka egnan bil við og koyra hagar einum lystir. Eisini er møguleiki at luttaka á skipaðu útferðunum.



* Íroknað kostnaðin er ferð fram og aftur í deildum 4 koyggjukamari við wc/bað innv.
Kamar u/vindeyga: kr. 500,- fyri kamarið.
Kamar v/vindeyga: kr. 700,- fyri kamarið.
Persónbilur: kr. 500,-. Øll avgjøld íroknað.
Prísirnir eru ikki galdandi fyri luksuskømur!
Tilboðið er treytað av, at pláss er umborð á Norrönu í nevnda tíðarskeiði.

**ÚTFERÐIR** (keypast umborð)

**MÝVATN (týsdag til mikudag)**
Vitjið náttúruperluna Mývatn og upplivið gandakendu náttúruna við dølum, fjallaskørðum og oyðnum gosplássum. Slappa av í heita geotermiska vatninum í nýggja Mývatn Náttúrubaðnum.

**SEYÐISFJÖRÐUR (týsdag kl. 13)**
Túrurin varir uml. 3½ tíma. Vitjað verður á áhugaverdum støðum í býnum. Ferðaleiðari er við á túrinum.

**EGILSSTAÐIR (mikudag kl. 13)**
Umframt Egilsstaðir verður vitjaður Hallormsstaðarskógur, Skriðuklaustur, savnið Fljótsdalur, Haifossur og Fellabær. Útferðin tekur uml. 4 tímar. Ferðaleiðari er við á túrinum.